## Khader skal venda gongdini

Nýggi danski flokkurin Ny Alliance, har Naser Khader er formaður, hevur verið fyri støðugari afturgongd, síðani flokkurin varð stovnaður í fjør. Byrjanin hjá flokkinum var flúgvandi, men tað minkaði bara burtur av undirtøkuni, og serfrøðingar hava kallað valstríðið hjá flokkum vanlukkuliga. Nú ætlar flokkurin at venda gongdini, og tað skal millum annað gerast við trimum nýggju spin-doktarum, sum skulu standa samskiftinum hjá flokkinum við almenningin. Teir báðir fyrstu spin-doktararnir hjá flokkinum eru fara úr sínum størvum.



## Jólasvimjing væl umtókt

Dagarnar millum jól og nýggjár vitjaðu eini 250 fólk í svimjihøllini dagliga, og tað er, sambært heimasíðuni hjá Klaksvíkar kommunu, væl meiri enn vanligt. Sum heild var jólamánaðurin góður hjá svimjihøllini, tí tilsamans 5000 fólk vitjaðu har tá. Klaksvíkar kommuna upplýsir á heimasíðuni, at tey í næstum fara at skipa fyri ymsum tiltøkum í svimjihøllini. Millum annað verður Virkishúsið partur av onkrum tiltaki, umframt at høllin eisini fer at verða brúkt í samband við Torradagarnar síðst í februar.

# Risa-universitet innan 10 ár

**Innan 10 ár áttu allar hægri útbúgvingar í Føroyum at verði savnaðar úti við Marknagilsvegin í einum risastórum universitetsdepli. Bæði Setrið, Læraraskúlin, Pedagogskúlin, Sjúkrasystraskúlin, partar av Handilsskúlanum og Vinnuháskúlin. Hetta sigur Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum**

ÚTBÚGVING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Meðan alt bendir á, at stóru miðnámsútbúgvingarnar framyvir verða at finna í Marknagili, heldur Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetrinum, at allar hægri útbúgvingar eisini áttu at búleikast í Marknagili*

Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, sær stórar møguleikar fyri sær, velja vit at leggja allar hægri útbúgvingar saman í ein stóran depil úti í Marknagili. Bæði Setrið, Læraraskúlan, Pedagogskúlan, Sjúkrasystraskúlan, partar av Handilsskúlanum og Vinnuháskúlan.

Nógv bendir á, at stóru miðnámsútbúgvingarnar fara at liggja í Marknagili framyvir. Rektarin á Fróðskaparsetrinum, Jóan Pauli Joensen heldur, at vit eisini áttu at savnað allar hægri útbúgvingarnar í sama umráði, nevniliga á stóra grundøkinum, sum Fróðskaparsetrið ræður yvir við Marknagilsvegin. Jóan Pauli Joensen sigur við Sosialin, at til ber at byggja eitt stórt campus við Marknagil, sum slík universitetsøki verða rópt á altjóða útbúgvingarmáli.

### Rópti varskó

Afturvendandi kjakið um Føroyar sum útbúgvingarparadís spretti enn einaferð í síðstu viku, tá ið vantandi fólkavøksturin og undirskotið á kvinnum var á breddanum her í blaðnum. Í hesum sambandi rópti eitt nú Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, varskó og staðfesti, at alneyðugt er við einum rættiligum universiteti, skulu vit standa okkum í altjóða kappingini um útbúnu arbeiðsmegina.

Jóan Pauli Joensen, rektari, greiðir frá, at Vinnuhúsið fyrr hevur víst á tørvin á gransking í Føroyum. Og hann fegnast um, at nýggi stjórin í Vinnuhúsinum beinleiðis leggur upp til, at vit fáa eitt stórt universitet beinanvegin.

### Góður vilji

Rektarin var eisini millum áhoyrararnar í tinginum herfyri, tá ið uppskotið um nýtt Fróðskaparsetur varð lagt fram. Orðaskiftið snúði seg um eina samanlegging av núverandi Fróðskaparsetri, Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla.

- Tað, sum slóð meg var, at øll tingfólk, sum tóku orðið, vóru sera positiv mótvegis hesum nýggja stovni, sigur Jóan Pauli Joensen, sum sjálvsagt harmast um, at málið datt niðurfyri á hesum sinni.

- Men við teirri fatan, sum politikararnir tykjast hava, er einki at ivast í, at málið skjótt kemur fyri tingið aftur, sigur rektarin á Fróðskaparsetrinum við Sosialin.

### Ikki bara bygningar

Men eitt er at byggja eitt stórt universitet. Sjálvandi eiga vit eisini at gera okkum greitt, hvørjar útbúgvingar vit ynskja at bjóða.

- Samanleggingin vil geva stórar møguleikar at uppstiga lærugreinir á Læraraskúlanum, eitt nú í teimum pedagogisku og sálarfrøðiligu lærugreinunum. Kunnu vit fáa 1 árs-lærugreinir á universitetsstigi, so fáa vit fleiri kombinatións-møguleikar á bachelorstøði.

Jóan Pauli Joenen vísir á, at undir orðaskiftinum í tinginum spurdu tingfólk, hví Vinnuháskulin ikki eisini hoyrir saman við nýggja universitetinum.

- Sambært Mentamálaráðnum er tað eisini ætlanin, men tað kemur í næsta umfari, sigur Jóan Pauli Joensen.

Eftir er so Handilsskúlin, sum partvíst er miðnámsskúli og partvís hægri læristovnur.

- Her átti at borið til at uppstiga partar av Handilsskúlanum, so teir komu upp á universitetsstøðið, og lagt henda partin saman við setrinum, sigur rektarin, sum heldur møguleikarnir vera fleiri.

### Kann ikki vera minni

Rektarin heldur tað vera alneyðugt, at vit brúka resursir uppá eitt størri universitet, tí sum er, kann Fróðskaparsetrið næstan ikki vera minni.

- Í flestu førum er bert ein lærari í hvørjari lærugrein. Og er ein lærari burturstaddur, til dømis í sambandi við sjúku, má undirvísingin leggjast niður, tí ongin er at taka yvir, sigur Jóan Pauli Joensen, sum eisini vísir á, at skal eitt slíkt universitet gerast veruleiki innan 10 ár, er neyðugt at fara undir hetta sum skjótast.

## Hørð kapping um altjóða ættarliðið

Kappingin um tey lesandi er hørð í hesum døgum. Danska blaðið, Weekendavisen, staðfesti í grein í oktober 2007, at altjóða útbúgving í dag er ein milliardforrætning, har serliga EU londini, USA og Kanada kappast um at draga at sær lesandi ungdóm úr øllum heiminum.

Á leið 2,5 milliónir fólk í ferð við at taka eina útbúgving í einum øðrum landi enn teirra egna, og metingar siga, at í 2025 verður talið 7,2 milliónir. Orsøkin til at lond ynskja útlendsk lesandi er bæði fyri at fáa góðar heilar til landið og at fasthalda bestu heilarnir, sum landið hevur.

Síðani álopið 11. september er talið av altjóða lesandi fallið í USA, meðan Kina av álvara er farið inn í kappingina um tey lesandi. Hetta hevur avleiðingar fyri USA - bæði búskaparliga og intellektuelt, og tí er ein stór lýsingarherferð sett í verk fyri at fáa serliga kinesisk lesandi at koma til USA at lesa.

Greinin í Weekendavisen staðfestir, at í kappingini um tey lesandi nyttar ikki at brúka tjóðskaparligan trúskap sum eitt amboð, tí unga ættarliðið er globalt. Øll verðin liggur opin fyri teimum, og tey velja at fara, har besta tilboðið er. Kappingar-parametrini mugu tí vera faklig dygd, fjølbroytt útboð og livandi sosialt kampuslív.

-dh-

## Útbúgving skapar vøkstur

Búskaparráðið gav í 2005 út eina temafrágreiðing um tøkniliga menning og vælferð, har tey leggja stóran dent á samfelagsliga týdningin av útbúgving, eisini á universitetsstøði. Sagt verður, at útreiðslur til gransking og menning eru at rokna sum íløgur í vitan, sum kann brúkast til at skapa nýggja tøkni og effektivari hættir at brúka verandi kapitalapparat.

Tí er sannlíkt at øktar útreiðslur til gransking og menning viðføra størri búskaparvøkstur.

Frágreiðingin sigur, at um politiska strategiin, sum hevur til endamáls at økja búskaparvøksturin, skal eydnast, so er neyðugt at raðfesta útbúgving fremst. Longri meðal skúlatíð økir produktivitetin hjá arbeiðsmegini, og økir bæði lønina hjá tí einstaka og hjá arbeiðsfjøldini undir einum.

Staðfest verður eisini, at vit í løtuni ikki hava lutfalsligar fyrimunir í vitanartungum framleiðslum, heldur ikki innan fiskaframleiðslu. Skulu vit flyta okkum frá veiðumentan og tilfeingisvinnum til vitanartungar vinnur, so er tí neyðugt við vitan og førleikum.

Samstundis væntar Búskaparráðið, at eitt størri útboð av fólki við granskingarførleikum helst fer at økja áhugan hjá fyritøkum – føroyskum og útlendskum – at seta ígongd granskingarvirksemi í Føroyum. Og harvið fleiri klókum heilum at velja Føroyar sum landið, har tey leggja sína orku, vitan, kreativitet og skattapengar.

-dh-